# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Abraham Løkin er partur av venjaratoyminum kring A-landsliðið, sum nú er farið undir fyrireikingarnar til dystin móti Serbia um eina viku*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Landsdystur í kvøld

**Fyrsta landsliðs-uppgávan hjá Brian Kerr verður í kvøld klokkan 19, tá U21- og A-landsliðið spæla venjingardyst móti hvørjum øðrum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í gjár byrjaði fyrsta landsliðsvenjingin hjá A-landsliðnum í fótbólti, síðani Brian Kerr tók við sum landsliðsvenjari.

Saman við U21-hópinum, sum leygar- og týsdagin skal spæla móti Rumenia og Russlandi, býr A-landsliðshópurin á Hotel Føroyum í hesum døgum, og eru tað fyrireikingarnar til dystin móti Serbia, sum eru á skránni.

Enn hevur Brian Kerr til góðar at síggja menninar í sínum hópi spæla saman í dysti, men tað fær hann høvi til í kvøld klokkan 19. Tá verður nevnliga venjingardystur spældur millum U21- og A-landsliðið. Og tað verður uttan iva spennandi at síggja, um hesin dystur á nakran hátt fer at avdúka, hvørjar tankar nýggi venjarin hevur kring samansetingina av liðnum.

Umframt Brian Kerr og hjálparvenjaran, Jens Martin Knudsen, telur venjarahópurin kring landsliðið nú eisini Abraham Løkin. Abraham var í fleiri ár strategurin á føroyska landsliðsmiðvøllinum, og í samband við 50-ára dagin hjá UEFA varð Abraham kosin sum besti spælarin í føroyskari fótbóltssøgu.

Umframt at taka A-prógvið sum fótbóltsvenjari hevur Abraham eisini verið virkin í arbeiðinum kring yngru landsliðini, og nú er hann altso eisini knýttur at A-landsliðnum sum annar av hjálparvenjarunum.

# Súsanna nummar 5 í elitukapping

**Súsanna Skylv Sørensen var fyri viku síðani partur av kapping á hálvum ironman teini í St. Polten í Eysturríki**

TRIATHLON
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hálvur ironman er samansettur við 1,9 km svimjing, 90 súkkling og hálvum marathon-teini, so tað eru ikki beinleiðis smálutir, sum standa fyri framman hjá luttakarunum.

Súsanna tók lut í sonevnda pro-bólkinum, men hóast knallhørðu mótstøðuna, so eydnaðist tað henni at gerast nummar fimm av kvinnunum. Og hon kom á mál bara fimm minuttir eftir vinnaran, sum saman við nummar tvey vann sær atgongd til HM-kappingina í Florida.

Sjálv vónar Súsanna, at hetta var startskotið til nakað veruliga stórt.

- Hjá mær er bara at venja fram móti World Championship-kappingini. Eg havi framvegis nógv, sum eg kann betra, so hetta er heilt víst ein stórur møguleiki hjá mær, sigur hon.



*Næsta stóra avbjóðingin hjá Súsonnu verður á Álandi, har hon er partur av føroyska Oyl-liðnum í frælsum ítrótti. Greinarnar hjá Súsonnu eru her 10 km og hálvt marathon*

## Bogi vann í Hammel

Føroyskir súkklarar luttóku á hvítusunnu í trimum kappingum í Danmark. Hetta eru afturvendandi kappingar, og eru tað Silkeborg, Viborg og Hammel, ið eru vertir fyri hesum.

Talan er um eina sera stóra kapping, og koma luttakarar úr eitt nú Týsklandi, Svøríki, Íslandi, Føroyum og Danmark.

Í føroyska hópinum vóru: Bogi Kristiansen, Torkil Veyhe, Guðmundur Joensen, Bogi Magnusson, Kjartan Egholm, Jens Glerup, Christian Guttesen og Gunnar Dahl-Olsen.

Væl gekk hjá føroysku súkklarunum, og fingu hesir fleiri góð úrslit. Torkil og Bogi vunnu sær stig í Silkeborg, Gunnar kom á mál saman við vinnaranum í Viborg og Bogi vann kappingina í Hammel.

Í Hammel bleiv koyrt 87 km. Teinurin gekk eitt nú niðan á væl kenda bakkan, Pytmølle, ið er ein bakki sum er hálvanannan km langur og hellur uml. 15 til 20 %. Men eftir drúgvar venjingar upp um Eiðisskarð, Hestin og Hovsegg var hetta ikki nakað, ið kundi forða Boga lættliga at vinna niðan á Pytmølle. Umleið 10 mans sluppu avstað saman við Boga, og hesir skuldu løtu seinni sprinta um gullið. Bogi var fyrstur og vann.



*Átta føroyskir súkklarar tóku um hvítusunnuna lut í stórum kappingum í Danmark*